TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**torshavn.fo/hoyringar**

# Broyting av almennu- og serstøku byggisamtyktini fyri Sjósavnið á Argjum

Endamálið er at útvega neyðugt pláss til Sjósavnið. Tórshavnar býráð samtykti á fundi 27. apríl 2023 uppskot um at broyta almennu byggisamtyktina og gera nýggja serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 56as og 82, Kirkjubøur (Argir), í smb. við ætlanir um at byggja nýtt sjósavn í økinum. Í hesum sambandinum varð eisini samtykt at heimila umsitingini at tillaga byggisamtyktar øki, um neyðugt.

Umsitingin hevur móttikið tilsøgn frá Búnaðarstovuni um at umleið 370m² av lendið (uml. 120 m², av matr.nr. 1063, og uml. 250 m², av matr.nr. 253, Kirkjubøur, Argir), sum er neyðugt fyri at fáa pláss fyri verkætlanini, verður selt til Tórshavnar kommunu eftir at byggisamtyktin er broytt. Tí snýr hetta uppskotið seg um at tillaga og broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at umleið 370 m² av D1-øki verður broytt til D3-øki, og at víðka økið fyri serstøku byggisamtyktina fyri Sjósavnið á Argjum tilsvarandi.

Tilfar, sum lýsir uppskotið um at broyta almennu byggisamtyktina og serstøku byggisamtyktina, liggur frammi á torshavn.fo og í Snarskivuni frá 14. oktober til 25. november 2024.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga til torshavn@torshavn.fo í seinasta lagi 25. november 2024.



